Arkiv Rediger Vis Meddelelse Format Funktioner Vindue Hjælp 10:30 Outlook Express

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Omdryd igen Indbakke

Frá: Edmund Jacobsen <faeringen@yahoo.dk>

Dagur 08.06.01

Til: eirikur@sosialurin.fo

Evni: Teldubrævið

TELDUBRÆVIÐ

Halgidagar — ein ókristilig dogma

Veitst tú, hví vit halda Hvítusunnu?

Jú, svarar tú ivaleyst. Eg veit, at hvítusunnudagur er fyri at hátíðarhalda, at heilagi andin tók búgv í lærusveinum Jesusar. Ein stórhending fyri øll kristin menniskju.

Men hví halda vit so eisini annan hvítusunnudag heilagan?

Tær nýtist ikki at svara.

Í veruleikanum kennir eingin svarið.

Tað finst nevniliga eingin bíbilsk grundgeving fyri at halda annan hvítusunnudag. Allíkavæl verður hesin dagur hildin sum halgidagur — og harvið eisini sum frídagur — bæði í Danmark og í Føroyum.

At eingin núlivandi kristniserfrøðingur kann siga frá, hví vit halda annan hvítusunnudag, er bara ein av fleiri vitnisburðum um, at halgidagarnir, sum vit kenna teir, eru ein stór, fløkt og óloysilig gáta. Halgidagarnir eru bara ein fastur táttur, ið allir føroyingar fáa inn við móðurmjólkini.

Vit halda teir. Vit spyrja ikki hví.

Í Danmark er tjakið so smátt byrjað, um ikki stundin er komin til at avskaffa allar teir gomlu, kristnu halgidagarnar. Danmark er nevniliga við at gerast eitt sokallað multietniskt samfelag, har serliga muslimar eru vornir ein stórur minniluti.

Í fleiri hundrað ár hevur eingin sett spurnartekin við jól, páskir ella hvítusunnu, men orsakað av tí stóru tilflytingini av fólki við aðrari mentan og siðum enn tí donsku, eru nú tekin um, at tað er við at venda í holuni.

Kristin menniskju vilja uttan iva framvegis nýta halgidagarnar til kirkjugongd, møtir og onnur kristin tiltøk, meðan ateistar og onnur ikki-trúgvandi kunna sova leingi, fara ein langan biltúr ella kanska lesa eina góða kriminalroman.

Men fyri trúgvandi muslimar hevur hetta als onga meining.

Í einum samfelag, har átrúnaðarfrælsi er grundlógarfest rættindi hjá øllum, er tað rein og sker diskriminatión, at muslimsk børn muga biðja sær frí frá skúlanum til teir muslimsku halgidagarnar, meðan donsk børn longu hava líknandi rættindi.

So tann leingi væntaða uppgerðin um heilgidagarnar í Danmark er byrjað. Og sjálvt um tað uttan iva fer at taka langa tíð at broyta núverandi skipan, so fer tað at henda fyrr ella seinni.

Men hvussu sær so út í Føroyum?

Jú, ikki kann sigast annað enn, at halgidagarnir liva og hava tað gott á klettunum. Eg plagi at verða í Føroyum um jólini og undrist ofta á, hvussu sterkar og rótfestar tær kristnu traditiónirnar eru. Kirkjugongd og møtir í hópatæl. Og haraftur-at ein mongd av sjónvarps- og útvarpssendingum, ið eisini boða kristna boðskapim.

Tað kann als ikki verða nakar ivi um, at Føroyar teljast ímillum tær mest kristnu tjóðirnar í heiminum. Í hvussu er um vit døma út frá halgidøgunum.

Men hvat nú um vit nú til stuttleika postulera, at teir flestu halgidagarnir í veruleikanum eru ókristiligir?

Eg havi varhugan av, at føroyingar flestir vilja mótmæla.

Men um vit nú hyggja nærri eftir bíbilsøguni, so var tað einans sunnudagurin, ið upprunaliga var halgidagur teirra kristnu.

Fram til reformatiónina vaks talið av halgidøgum tó støðugt. Fyrst komu Páskini, so Hvítusunnan og Kristi Himmalsferðardagur. Enn fleiri halgidagar komu afturat, og til endans var talið av halgidøgum so stórt, at tað gjørdist ein fíggjarligur trupulleiki fyri fólk og samfelagið sum heild.

Vanlig fólk høvdu nevniliga slettis ikki ráð til at halda frí allar hesar halgidagarnar.

Reformatiónin í 1536 setti tó endaliga punktum fyri hesari »halgidags-inflatión«. Martin Luther — ið legði lunnar undir tí kristnitrúgv vit kenna í dag — hevði upprunaliga bestan hugin til at avskaffa allar halgidagar uttan sunnudag. Men hann lat seg tó yvirtala til at varveita teir týdningarmestu halgidagarnar. Seinni vóru tó enn fleiri halgidagar strikaðir, eitt nú triðji Páskadagur, triðji jóladagur og nakrir afturat.

So bíbilsøgan vísir okkum, at tað ikki er Nýggja Testamenti, ið dikterar kristin menniskju til at halda halgidagarnar heilagar. Í veruleikanum eru teir flestu halgidagarnir bert leivdir frá gomlum, katólskum siðum, sum eingin reiðuliga kann fáa skil á longur.

Tað kann væl vera, at føroyingar halda halgidagarnar heilagar, men í nógvum førum hevur tað als einki við kristindóm at gera.

Men hvat so? Kunna vit ikki bara lata halgidagarnar verða í frið?

Nei, tað kunna vit ikki. Veruleikin er jú tann, at halgidagarnir í nógvum førum eru til stóran ampa fyri fólk, ið ikki eru kristin.

Trúgv er ikki ein kollektivur spurningur, men ein persónligur spurningur. Tá lóggávan dikterar, at øll óansæð mentan, lívsáskoðan ella átrúnað skula halda teir kristnu halgidagarnar heilagar, ja so er lóggávan jú við til at kroysta kristnar siðir niður um høvdið á teimum, ið heldur vildu sluppi undan.

Ein slík lóggáva er jú diskriminerandi, og tískil í roynd og veru ókristilig.

Kaðalmontørur til Føroya Tele - Suðuroy

"Eingin framtíð er í starvinum, framtíðin er í starvsfólkinum."

George Crane



Søkt verður eftir kaðalmontøri til Føroya Tele í Suðuroy at byrja skjótast tilber. Á Føroya Tele í Suðuroy starvast íalt 9 fólk. Fólki søkt verður eftir, skal arbeiða í stóran mun við nýgerð og viðlíkahald av kaðalnetinum og telefoninstallatiónum.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiði við atliti til:
- nýgerð og viðlíkahald av kaðalnetinum og telefoninstallatiónum
- vanliga telefonútgerð
- innanhýsis kaðalskipanir
- uttanhýsis kaðalskipanir
- skráseting av kaðalneti
- annað fyrifallandi

Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:
Elektronikmekanikari, elektrikari og/ella hollar royndir sum kaðalmontør.

Tað er ein fyrimunur, at tú í stóran mun kanst arbeiða sjálvstøðugt, er opin og dugir væl at samstarva og tosa við viðskiftafólk og hevur royndir innan EDV á brúkarastøði.

Arbeitt verður um alla Suðuroynna og uppmøtingarstaði er hjá Føroya Tele á Tvøroyri.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fróða Mortensen, økisleiðari tel. 371000 ella starvsfólkadeildina tel. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. juni 2001.

Umsóknir skulu sendast til

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Tel 303030, fax 303031, www.tele.fo

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!

Runavíkar Kommunuskúli

Søkt verður eftir **lærarum** til skúlaárið 2001/2002.

- 4 størv 26,5 tímar fyri lærarar í farloyvi
- 4 størv 26,5 tímar fyri lærarar, ið hava niðursett tímatal

Størvini, sum eru tíðaravmarkað skúlaárið 2001/2002, verða sett sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum frá 18.1 til 24.4.

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 447331.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mikudagin 20. juni kl. 16.00.

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum!


RUNAVÍKAR KOMMUNA.

Runavíkar Skúlanevnd
v/ Jákup Hansen
Sýnarvegur
FO-625 Glyvrar

Listaframsýning á Ólavsøku

n b r a n k ara r r
r a ra nn a k
M er akk

Opið verður 28., 29., 30. og 31. juli frá kl. 14.00–20.00.

Hevur tú hug at taka lut í hesi framsýning, set teg so í samband við Lions Club Tórshavn, tlf. 314400 - 316620 - 319798.

Lions Club Tórshavn

Bilur við skaða til sølu

Merki: Kia Sephia GTX
Árg.: 1996
KM.: 68.347

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Suni Danielsen, sýnsmaður
e-mail: sd@trygging.fo
Tlf. 448190
at hitta millum–hósdag millum kl. 09[30]–10[30]

Gøtu Kommuna

Reingerðarfólk til Gøtu Skúla

Fyri eitt av reingerðarfólkunum, ið fer í farloyvi í 1 ár frá medio juni 2001 til medio 2002, verður her søkt eftir avloysara.

Umsóknir mugu vera Gøtu Kommunu í hendi innan fríggjadagin 15. juni kl. 12.

Merkið brævbjálvan: Reingerð.

Gøtu Kommuna
Postboks 40
FO-510 Gøtu

ella í brævsmoguna í hurðini á kommunuskrivstovuni.

Bilur við skaða til sølu

Merki: Toyota Avensis 1.8 – Linea Terra
Árg.: 2000
Km: 20.500

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast í garðinum hjá Tryggingarfelagnum á Smyrilsvegi í Havn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Heri Weihe, sýnsmaður
tlf. 345729
fax nr. 345607
e-mail hw@trygging.fo
at hitta mánadag til hósdag millum kl. 08.30-10.00 og fríggjadag millum kl. 10.00-15.00.

Gøtu skúli

Søkt verður eftir lærarum

til tíðaravmarkað størv við Gøtu skúla fyri skúlaárið 2001/2002.

1 lærari at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærara í farloyvi og
1 lærari (parttíðarstarv) at undirvísa uml. 20 tímar um vikuna.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum frá 18.1 til 27.4.

Fyrispurningar um størvini kunnu setast skúlaleiðaranum á tlf. 441059.

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mikudagin 20. juni kl. 18.00.

Gøtu skúlanevnd
v/ Tórhalli Thomsen
FO-512 Norðragøta

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið

Skrivari

Vegna barnsburðarfarloyvi er avloysarastarv sum skrivari á lógardeildini í Stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya leyst at søkja til setan frá 1. august 2001 ella skjótast til ber og til 1. september 2002.

Arbeiðsuppgávur
Skrivarin røkir m.a. hesar uppgávur:
- heldur skil á málum
- fyrireikar mál
- skrivar brøv
- setir upp rundskriv, kunningarskriv, vegleiðingar o.a.
- rættlesur og umsetir t.d. brøv, viðmerkingar til lógir o.a.
- málsviðgerð

Førleikakrøv
Vit vænta okkum, at skrivarin hevur hesar førleikar og eginleikar:
- góðar samskiftisførleikar
- dugir at nýta Microsoft Word og Outlook – hetta er ein fyrimunur ikki eitt krav
- setir seg skjótt inn í ymisk viðurskifti
- sjálvstøðugan arbeiðshátt og kann raðfesta arbeiðið
- góð samstarvsevni

Setanarviðurskifti
Starvið verður lønt í 3. lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Løn og setanarviðurskifti verða ásett eftir sama sáttmála.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Anju Hovgaard á tlf. 35 26 00.

Umsóknir
Umsóknir við avritum av prógvum og viðmælum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi 21. juni 2001.

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Traðagøta 39
Postboks 2151
FO-165 Argir

Toll og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg- og inntøkuskattalóggávuna, herundir eisini kolvetnisskattalóggávuna, og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum og fyri onnur lond har sáttmáli fyriliggur. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum.Tær seks økisskrivstovurnar, sum eru í Klaksvík, Saltangará, Sørvági, Skopun, á Tvøroyri og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Stýrinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 34 starvsfólk, og er tað skipað í fimm deildir.

Hagafundur

Lýst verður til hagafund fyri Strandahaga í Klaksvík, í skúlanum á Ziskatrøð, leygarkvøldið 16. juni kl. 20.00.

Skrá:
1. Støðutakan til sáttmálarnar við SEV og Klaksvíkar kommunu
2. Støðutakan til umbøn frá harumonnunum
3. Ymiskt

Hagastýrið